Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

Svarari: Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

Evni: Rætturin til eftirnavn og rætta skráseting í landsfólkayvirlitinum

Spurningar:

1. Kann eitt barn fáa eftirnavnið hjá sammóður síni?
2. Kann eitt barn skrásetast í landsfólkayvirlitinum við eini mammu og eini sammóður?
3. Um svarið uppá spurningarnar er nei, ætlar landsstýrismaðurin at leggja uppskot fyri tingið um at broyta hetta ?

Viðmerkingar:
Við broytingunum í lógini um børns retsstilling og foreldramyndugleikalógini, sum vórðu samtyktar í seinastu tingsetu og komu í gildi 1. januar 2022, fingu børn hjá samkyndum kvinnum rætt til tvey foreldur frá føðing, og samkyndar kvinnur kundu fáa foreldramyndugleika til síni børn frá føðing.

Spurningurin er, um onnur lóggáva er í samsvari við hesa rættarstøðu, og um eitt barn kann fáa eftirnavnið hjá sammóður síni og kann skrásetast í landsfólkayvirlitinum við eini mammu og eini sammóður.

Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at fáa greiðu á hesum málinum.

Á Løgtingi, 3. august 2022

Hervør Pálsdóttir